## DAGSINS MEINING

### Tjóðardagur og deyðarevsing

4. juli kundu amerikanarar hátíðarhalda sín tjóðardag. Henda dag í 1776 sprætt tann víðagitna frælsisorðingin úr fólkakravinum til demokrati og rættvísi. Ein hending, sum skuldi fáa avgerandi týdning fyri ikki bert amerikanarar men fyri allan heimin – og sum amerikanarar hava alla grund til at vera ernir av. Men í tey meira enn 225 árini amerikanska tjóðin hevur verið til hevur USA uppá gott og ilt gjørt sína ávirkan galdandi um allan heim. Við dugnaskapi, vilja og eldhuga hava amerikanarar verið við til at seta dagsskránna í heiminum. Leingi hevur landið verið eitt av heimsins ríkastu og mætastu og hevur tað tí eisini havt stóra ávirkan á menning kring heimin. Slíkan tjóðardag eigur USA sjálvandi at fáa tøkk fyri tað góða landið hevur gjørt í heimshøpi, har tað m.a. varð við at gera enda á bæði týskunum og japanaserunum undir 2. heimsbardaga, fyri tess leiklut í kalda krígnum og nú loksins fyri tess leiklut at basa altjóða terrorismu.

Men slíkan dag eiga vit so heldur ikki at gloyma USA fyri tess óhepnu og ódemokratisku gerðir eitt nú í Vietnam, Chile oa. Tað, sum tó kemur okkum fyrst og fremst til hugs, tá tað um mannarættindi og USA ræður, er deyðarevsingin. At landið, sum hevur útrópt seg til at vera “Gods own country” og sum hevur føtt og fostrað fyrstu frælsisorðingina, skal taka sínar egnu borgarar av døgum er einki minni enn ein skamblettur fyri sama frælsisdag 4. juli.

Eins og USA roynir at leggja seg út í ófrælsi og brot á mannarættindi í øðrum londum eiga vit í øðrum londum at leggja okkum út í brot á mannarættindi í USA. Tí er arbeiðið hjá Amnesty at gera vart við ta brotsgerð, sum deyðrevsingin í USA er, av alstórum týdningi. Tað var tí eisini hugaligt at hoyra útvarpið nú um dagarnar endurgeva amerikanska dómaran Jed Rakoff, sum í einum úrskurði sigur, at deyðarevsing er statsfíggjað morð á ósek fólk. Tað var eisini hugaligt herfyri at frætta, at amerikanski hægstirættur ógildaði 150 deyðadómar við at banna myndugleikunum at avrætta menningartarnaðar brotsmenn.

Men hetta hóvar ikki øllum. Amerikanski løgmálaráðharrin, sum Bush forseti valdi at seta hóast stóra mótstøðu í amerikanska fólkinum, roynir nú av øllum alvi at ganga beint ímóti amerikanska fólkaviljanum, sum er við at broyta áskoðan um deyðarevsing. Fleiri og fleiri amerikanarar vilja hava deyðarevsingina avtikna, ikki minst eftir, at fleiri fólk, sum eru dømd til deyða, eru fríkend, tí DNA-royndir vístu, at tey høvdu ikki gjørt tað, tey vórðu dømd fyri. Hesum ráki roynir tann kaldi og kyniski starvsbróðurin hjá Bush, nú at forða við eitt nú at tvinga statir, sum ikki loyva deyðarevsing, at gera tað kortini. USA og Bush hava ein alvorligan trupulleika. Hesin eitur deyðarevsing, hann eitur eisini Aschroft. Umheimurin má leggja trýst á USA at taka av deyðarevsingina og við at útrópa løgmálaráðharran sum heimsins fígginda nr. eitt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Dagliga húsarhaldið og inntøkumøguleikar

**Hans Birgir Hansen**



Vit føroyingar kunnu bæði tjena og spara nógvan pening í tí dagliga húsarhaldi við broytingar av lívsháttarlagi og lívsvanum, etingar, drykkju, nýtslu, innkeyps!

Tak til dømis týdning av at liva og virka rætt, at eta og rekka og nýta forbrúksvørur rætt við at lesa etikettir uttan á øllum vørum og fáa kunna seg um innihaldið.

Hví gjalda hópin av pengi at oyðileggja sær bæði lív og heilsu á fleiri hættir, tá tit kunnu gera tað øvugta og bæði vinna og spara nógvan pening – hvat fleiri gera.

Vit føroyingar kunnu raðfesta/prioritera alt øðrvísi og leggja heima- og útiarbeiði og familju og frítíðar- og privatlív og summarferiur til rættis úti um alt landið.

Tað kann sleppast undan dagligum stressi allastaðni við at øll gevast við at arbeiða og loysa uppgávur út yvir tað ein í tí dagliga klárar heima og úti um alt landið.

Hví ikki taka tykkum saman hvør einasta familja úti í hvørjum einasta húsarhaldi á bygd/bý í øllum útjaðaraoyggjunum og norður- og streymoy í dag.

Vit skulu fáa reina og fríska innandura luft, reint drekkivatn, reinar drykki- og mat- og nýtsluvørur, ið ikki innihalda kemikaliir og tilsetingar og litevnir í dag.

Tað er tá vit fyribyrgja øllum skaðiligum árin á heilsuna og vælveruna, hugsu um hvønn týdning alt hetta í dag hevur búskapar- og samfelags- og vinnuliga.

Vit kunnu soara 100 tals mió. Kr. Á hvørjum tí einasta ári, fáa vit framt slíkt úti í øllum landshúsarhaldi, og á arbeiðsplássum og úti í felagsskapum v.fl.

Tað er avgerandi neyðugt at øll gerast seriøs, virkisfús og mtovera í øllum tí dagliga arbeiðI, og frítíðar- og privatlívi, í øllum samskifti í millum manna.

Tá vil allur heimurin liggja opin fyri øllum frá myndugum alri út um alt landi í vilja gerast rík í dag.

# Dansitiltøk á varmakeldustevnuni

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið skipar ÍF fyri dansi fyri teimum ungu.

Tiltøkini verða ávikavist í Mentanarhúsinum og ítróttahøllini í Kambsdali. Fríggjakvøldið leggur Jan Gardar fløgur á í nýggja Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Leygarkvøldið spælir vælumtókti bólkurin, All That Rain, í ítróttahøllini í Kambsdali. Bólkurin er júst vorðin fullmannaður aftur, eftir at trummusláarin, Henning Nicodemussen, er komin aftur úr Danmørk. All That Rain fer leygarkvøldið at spæla heimagjørdan tónleik umframt løg, sum hoyrast á útvarpsræsunum kring heimin. Dansurin í Kambsdali leygarkvøldið byrjar kl. 23.30, og endar kl. 03.45.

Leygarkvøldið skipa Fuglafjarðar Sjónleikarafelag fyri dansi í nýggja mentanarhúsinum. Hetta tiltak er kanska serliga ætla teimum meir tilkomnu, tí dansibólkurin Driv spælir til dans.



*Teir tríggir í All That Rain spæla til dans í ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið*

### Sunnukvøldið spælir JM Band í Mentanarhúsinum

Vit kenna hann sum fyrrverandi gittarleikara og sangara í All That Rain. Hann gavst í bólkinum herfyri og hevur síðan fingist við at spælt saman við ymsum føroyskum tónleikarum. Seinast, vit hoyrdu frá honum, var tá ið hann royndi seg í tónleikakapping, sum danska sjónvarpsstøðin, TV2, skipar fyri. Kappingin, sum nevnist POPSTARS, er skipað soleiðis, at áhugað kunnu melda seg til. Tey sleppa so at syngja og spæla fyri eini dómsnevnd. Fleiri túsund meldaðu seg til kappingina, og okkara maður varð ein av teimum 25, sum vórðu vald út at kappast víðari.

Maðurin er sjálvsagt kollfirðingurin, Jens Marni Hansen. Aftur at sær at spæla sunnukvøldið hevur hann nakrar av mætastu tónleikarum Føroya. Saman nevna teir seg JM Band. Teir, sum manna bólkin, eru Ólavur Øster við gittara, Pauli Magnussen við bassi og James Olsen við trummum. Allir hesir er úrmælingar, hvør á sínum øki, og tað merkir eisini tónleikin, sum teir spæla. Teir fara at spæla dansitónleik fyri ungum og eldri.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Fiskur, fuglur og olja lið um lið

**Framsýningarnar í gamla bátaneystinum á Debesartrøð eru nú aftur opnar fyri almenninginum. Nú síggjast oljupallar og grindahvalir undir sama taki**

FRAMSÝNING
*Jan Müller*



*Hóast oljuvinnan er ein mansdominerað verð, so ger hetta seg í hvussu er ikki galdandi á oljuframsýningini á Debesartrøð. Her eru tað kvinnurnar, sum standa á odda. Her eru tær tríggjar, sum hava fyrireikað framsýningina, Anette Jægerup, Jonhild Johannesen og Lis Mortensen saman við stjóranum á Jarðfrøðissavninum, Martin Heinesen*

*Mynd Jan Müller*

Framsýningarnar í gamla bátaneystinum hjá Føroya Náttúrugripasavni eru nú latnar uppaftur. Tað hendi seinasta leygardag og varð rættiliga fitt gjørt burtur úr upplatingini og her eisini setanini av eini heilt nýggjari og heldur óvanligari framsýning um oljuleiting. Oljuframsýningin er nú ikki tað einasta nýggja, tí Náttúrugripasavnið hevur í sama viðfangi gjørt onkrar áhugaverdar broytingar í sínum framsýningum, eins og hølini eru sett í nýggjan stand.

Tað var Martin Heinesen, stjóri á Jarðfrøðissavninum, sum lat framsýningarnar upp og beyð umboðum fyri myndugleikar, stovnar og miðlar vælkomnum. Hann vísti á, at gamli lærumeistari hansara, Jóannes Rasmussen sáli, plagdi onkuntíð at taka nakað soleiðis til, at vitan ikki hevur so nógv at týða so leingi, sum hon bert finst inni í høvdinum á onkrum serstøkum persónum ella í einum avmarkaðum kanningarumhvørvi. Vitan og kunnskapur koma ikki til sín rætt og fáa ikki veruligt virði, fyrr enn tey verða breidd út til onnur at fáa gleði av.

- Hetta grundsjónarmið livdi hann til fulnar upp til. Tað lá til grund, tá hann longu undir tí fyrsta landsstýrinum fyri meiri enn hálvari øld síðani fekk í lag at seta á stovn Jarðfrøðisavnið, og síðan legði lunnar undir Føroya Náttúrugripasavn. Somuleiðis tá hann saman við øðrum m.a. tók stig til Fróðskaparfelagið og til at stovna Fróðskaparsetur Føroya.

Tá Jarðfrøðisavnið fyri fáum árum síðani varð skipað sum sjálvstøðugur stovnur og fekk sína serskildu reglugerð, var tað eisini av stórum týdningi longu í endamálsorðingini at fáa staðfest, at eitt av aðalmálunum við stovninum er at breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu virðum.

Eitt av høvuðsamboðunum til at breiða út henda kunnleika er at vísa fram lutir, myndir og frágreiðingar á ein hátt, sum lætt kann geva fólki innlit í Føroya jarðfrøði og í týdningin av jarðfrøðiligu virðunum fyri okkara samfelag.

- Tí var tað eisini natúrligt, at Náttúrugripasavnið og Jarðfrøðisavnið – hóast vit formliga fóru hvør sín veg – varðveittu tøtt sambond, serliga við atliti at framsýningarvirkseminum. Henda framsýning er eitt beinleiðis úrslit av hesum samstarvi segði Martin Heinesen og vísti á, at tey, sum av og á vitja framsýningarnar á Náttúrugripasavninum, hava helst lagt til merkis, at lítið nýtt er hent við jarðfrøðiliga partinum av framsýningunum tey seinastu mongu árini. Ein av orsøkunum til tað hongur saman við tí stóru broyting í virkseminum í síni heild á Jarðfrøðisavninum hetta seinasta 10-áraskeiðið.

Sum kunnugt vórðu ráevnini í føroysku undirgrundini yvirtikin sum føroysk sermál í 1992, og hetta fekk eina kolveltandi ávirkan á virksemið og á alla tilveruna hjá Jarðfrøðisavninum.

Hann helt annars fyri, at tey hava frá fyrsta degi verið tætt knýtt at menningini av tí føroysku oljuumsitingini, og afturat tí hava tey yvirtikið ábyrgdina av jarðfrøðiligu kanningunum av Føroyaøkinum í síni heild, sum Danmarks Geologiske Undersøgelse hevði áður. Samstundis sum alt fleiri fólk hetta 10-ára skeiðið eru sett á Jarðfrøðisavninum, hava kortini ikki verið kreftir til nógv annað enn tað, sum knýtt hevur verið at oljuvirkseminum.

Men við væl og stuðuli frá fleiri síðum hevur eydnast stovninum ikki bert at fáa sett ein royndan kanningarstjóra men samstundis eitt fólk afturat, sum burturav skuldi taka sær av kunningar-virkseminum. Anette Jægerup, sum varð sett í starv við ársbyrjan, hevur víð stórum hegni og dugnaskapi fingið eina framsýning á føtur, sum lýsir nøkur av teimum nógvu áhugaverdu viðurskiftunum, ið knýta seg at oljuleitingini á landgrunninum.

Martin Heinesen nevndi eisini arkitektin, sum hevur verið knýttur at framsýningini, Jonhild Johannesen, sum hevur víst seg at vera eitt arbeiðsgrev og íblásari. Samstundis sum hon hevur lagt eitt veldugt arbeiði fyri dagin, hevur tað eisini verið ein sonn fragd og avbjóðing hjá hinum at arbeitt saman við henni, og hon hevur so sanniliga verið við til at lyfta tað samlaða verkið upp á eitt hægri støði, enn tey høvdu megnað uttan hennara hjálp.

Framsýningin varð heldur ikki vorðin til uttan nógva hjálp og vælvild frá fleiri øðrum síðum vísti Martin Heinesen á og sipaði her m.a. til teir spennandi lutir og annað tilfar til láns frá oljufeløgunum, sum virka í Føroyum og hevur Sosialurin uttan himpr latið myndir úr teirra áhugaverda savni at nýta. Eisini hava málkøn fólk uttan fyri stovnin givið eina hond við, tá tekstirnir skuldu evnast til.

Við framsýningini verður roynt at lýsa nøkur av teimum viðurskiftum, ið knýtt eru at oljuleitingini. Serstakur dentur er lagdur á jarðfrøðiligu viðurskiftini og tann leiklut, tað jarðfrøðiliga og jarðalisfrøðiliga arbeiðið hevur í hesum sambandi.

Hesin leiklutur er ein samskipaður partur av eini nógv størri heild. Serliga í einum umhvørvi sum okkara, har oljuleitingin gongur fyri seg langt til havs á ógvuliga djúpum vatni, fevnir samlaða leitingarvirksemið um eina ørgrynnu av tungari serútgerð og um arbeiðuppgávur, sum verða framdar av serútbúnum fólki.

- Vit, sum dagliga ganga turrskødd her uppi á landi, síggja lítið til hetta áhugaverda virksemi, og tí hildu vit, at framsýningin ikki nýttist at avmarka seg til bert at lýsa tey jarðfrøðiligu viðurskiftini, men at tey kundu vera stuttlig og vónandi av áhuga fyri tey vitjandi at kunna seg eitt sindur inn í samlaða virksemið, sum er knýtt at oljuleitingini og til ta gongd, sum hevur ført okkum fram til støðuna, sum hon sær út í dag. Og so vildi Eyðun helst ikki verið blíður, um vit gloymdu at taka nakað við um týdningin av at verja okkara virðismikla havumhvørvi.

Nøkulunda. Stjórin á Jarðfrøðissavninum vónaði, at framsýningin, hóast man bara hevur havt møguleika at taka tað mest týdningarmikla við, kann geva teimum vitjandi eina uppliving og nýggjan kunnleika, sum tey kunnu gleðast yvir og fáa gagn av.

Fasta framsýningin á Debesartrøð er opin vanligar dagar millum kl. 11 og 16 og í vikuskiftinum millum 15 og 17.



*Aðalstjórin á Oljumálaráðnum Herálvur Joensen helt dótturin Rakul skuldi hoyra um annað enn olju, so tey førkaðu seg eina løtu yvir til hina framsýningina við fugli*

*Mynd Jan Müller*



*Hesir tríggir eru allir partar av oljuvinnuni so ella so og høvdu nógv at tosa um á oljuframsýningini. Jóhan H. W. Poulsen hevur staðið fyri gerð av orðalista um oljumál, Johan Mortensen er stjóri hjá Anadarko og hevur verið virkin í hesi vinnu leingi og síðani Halgir W. Poulsen, sum var ein av undangongumonnunum í samráðingunum við bæði danir og bretar í sambandi við ráevni og undirgrundarmark*

*Mynd Jan Müller*